


*Súkklingin var ikki við á Oyggjaleikunum í Álandi fyri tveimum árum síðani, so føroysku súkklararnir eru svangir eftir aftur at sleppa á royna seg*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Súkkla um plássini

**SÚKKLING** Í kvøld og í morgin skulu okkara bestu súkklarar kappast um at sleppa við til Oyggjaleikirnar á Isle of Wight, har fimm mannfólk og trý konufólk sleppa við

Hilmar Jan Hansen

Í kvøld klokkan 18 er ein 45 kilometra langur einkultstart-ur á skránni frá Kollafirði norður ímóti Ljósá, har súkkl-ararnir venda og súkkla aftur til Kollafjarðar. Og í morgin klokkan 14 verður landavegs-súkkling úr Havn og norður til Hvalvíkar og Streymnesar, har vent verður og súkklað aftur til Havnar, har málið er við Plantusøluna í Hoydølum.

Eftir kappingina í morgin verður avgerð tikin um, hvørji fimm mannfólk og trý konu-fólk sleppa við til Isle of Wight í summar.

Tað er danskarin, Jacob Agger Troelsen, sum saman við Gunnari Dahl-Olsen stendur fyri venjingini av føroysku súkklarunum, sum hava vant, verið til royndir og á venjingar-legu, so teir skulu vera so væl fyri sum møguligt.

Súkklingin var ikki við á Oyggjaleikunum í Álandi fyri tveimum árum síðani, men á Rhodos fyri fýra árum síðani vann føroyska súkklulandsliðið silvur í liðkappingini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Fleiri opnir dystir

**FÓTBÓLTUR** Nú annað umfar í lands-kappingini er á skránni, vilja summi lið reisast og onnur halda fast. Fyrsti dysturin er longu í kvøld í Sarpugerði millum Víking og NSÍ

Hilmar Jan Hansen




*Fyrsti dysturin í øðrum umfari í landskappingini verður longu í kvøld klokkan 18, tá Víkingur í Sarpugerði tekur ímóti NSÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum vant, eru eysturoyarliðini so væl umboðað í Vodafonedeildini, at tað næstan ikki er eitt umfar, har ikki onkur av dystunum er ein grannauppgerð millum tvey lið í Eysturoynni. Ein var í fyrsta umfari millum B68 og ÍF, og í kvøld klokkan 18 er aftur ein, tá Víkingur í Sarpu-gerði tekur ímóti NSÍ.

Víkingur hungrar eftir at vinna og man kenna eitt sindur av trýsti á sínum herðum, tí liðið tapti fyri EB/Streymi í fyrsta umfari, og hinvegin vilja teir í NSÍ halda fast við góðu byrjanina við sigri á HB. Hetta er ein av teimum dystunum, har alt kann henda, so hesin má metast sum púra opin.

Tað var ikki gamalt at siga tað sama um dystirnar, tá HB á heima-vølli spælir ímóti vágamonnum, men hóast HB er favorittur í morgin ímóti 07 Vestur, sum heima tapti fyri B36, er hetta eisini ein rímiliga opin dystur. Bæði liðini taptu í fyrsta umfari og vilja tí hava stig hesa ferð. HB vil hava øll trý, men teir í 07 Vestur eru kanska nøgdir við eitt, heldur enn einki.

## B36 stórfavorittur

Hinir tríggir dystirnir eru allir sunnudagin, og tann millum ÍF og EB/Streym er tann einasti hetta umfarið, sum er millum tvey lið, ið bæði vunnu fyri viku síðani. ÍF fekk í vindinum á Svangaskarði koppað B68, og EB/Streymur vann heima á Víkingi. Nú er ÍF á heimavølli og EB/Streymur á útivølli, og hava báðir partar tað mesta av fólkinum tókt, kann alt henda í hesum dystinum.

B36 er uttan iva allarstørsti favo-ritturin hesa ferð, tí árstalsfelagið tekur í Gundadali ímóti B71, sum sanniliga ikki fekk nakra ynski-byrjan, tá liðið ímóti KÍ fyrst fekk ein mann útvístan og so ein aftrat.

B36 vann á útivølli á 07 Vestur, tá vælskipaða verjuspælið trekti tenn-irnar úr mótstøðuni, men hesa ferð skal B36 vísa, at liðið á heimavølli er ført fyri at skapa dystin.

Fimti dysturin er helst fyrsta veruliga avbjóðingin hjá KÍ í ár, tí eftir tveir heldur lættar dystir í steypa- og landskappingini, er B68 mótstøðuliðið. Toftamenn, sum hildu seg einki standa aftan fyri ÍF mánakvøldið, men taptu, vilja nú vísa sínar veruligu dygdir í betri líkindum, samstundis sum KÍ vil vísa, at liðið er komið uppaftur – bæði so og so.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 6 | 0 | +6 | 3 |
| 2 | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 0 | +3 | 3 |
| 3 | ÍF | 1 | 1 | 0 | 0 | 4 | 3 | +1 | 3 |
| 4 | NSÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | +1 | 3 |
| 5 | EB/Streymur | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | +1 | 3 |
| 6 | B68 | 1 | 0 | 0 | 1 | 3 | 4 | -1 | 0 |
| 7 | Víkingur | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 | HB | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 9 | 07 Vestur | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 10 | B71 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 6 | -6 | 0 |

## Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 2 | 2 | 0 | 0 | 9 | 2 | +7 | 6 |
| 2 | KÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 5 | 1 | +4 | 6 |
| 3 | Skála | 2 | 1 | 0 | 1 | 1 | 4 | -3 | 3 |
| 4 | HB | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 5 | B36 | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 | 4 | -3 | 1 |
| 6 | Víkingur | 2 | 0 | 0 | 2 | 3 | 7 | -4 | 0 |

# Stóri finalu-dagurin

**FM-FINALUR** Dagurin í morgin er tann heilt stóri dagurin á árinum hjá okkara fremstu íðkarum í badminton, borðtennis og judo, sum aftur í ár eru saman um sínar FM-finalur

Hilmar Jan Hansen

Higartil hevur stóra felagstiltakið hjá teimum trimum ítróttargreinunum roynst so væl, at tað tykist vera ein sjálvfylgja, at tað verður endurtikið. Badminton og borðtennis byrjaðu tað í 2006, og árið eftir kom judo uppí. Fyrstu árini var stóri FM-finaludagurin í Badmintonhøllini í Havn, men í ár er tað annað árið á rað, at ítróttarhøllin á Hálsi hýsir tiltakinum, sum tey rópa Nema FM.

Lagt verður til brots longu klokkan 9.30 í morgin, og síðani verður hildið fram ígjøgnum allan dagin, tí ikki færri enn 16 finalur eru á skránni. Sjónvarpið hjá Kring-varpinum sendir beinleiðis seinna-partin, og um kvøldið verður so gallaveitsla, har tey bestu í bad-minton, borðtennis og judo verða heiðrað við herðaklappi.

Nógv verður gjørt burturúr um-støðunum kring kappingarnar, so bæði tey íðkandi og áskoðarar fáa eina ógloymandi heildaruppliving, samstundis sum tey, ið varða av einari av ítróttargreinunum, óivað eftir loknu finalurnar vita munandi meira um hinar báðar greinarnar.

*hilmarjan@sosialurin.fo*